# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*24. september fekk Drós eina lítlasystir. Foreldur teirra eita Beinta og Hans Arni Olsen og tey búgva í Rituvík. Lítlasystirin var 56 cm long og vigaði 3700 gr.*

13. september fingu Malan Lamhauge og Henrik Olsen ein son. Hann vigaði 3030 gr og var 50 cm langur.

18. september fingu Ingrid Michala Jacobsen og Sergio Sannino, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

22. september fingu Ann Ellingsgaard, Tórshavn, og John Erik Mellemgaard, Skálavík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

23. september fingu Annufía Joensen og André Thomsen, Søldarfirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3030 gr.

23. september fingu Jóhanna Olsen og Leif Láadal, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3600 gr.

24. september fingu Una Hansen og Gunnar Isfeld, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4508 gr. Bjørk (4 ár) er blivin stórasystir.

25. september fingu Halda og Davis Dalbø, Syðrugøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3850 gr.

25. september fingu Anna og Hjalgrím Magnussen, Fuglafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

26. september fingu Heidi Dam, Kollafirði, og Bartal Eliasen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

27. september fingu Katrin (f. Mørkøre) og Gunnar Toftegaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

28. september fingu Rannvá J. Simonsen og Mikkjal Gaard Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3450 gr.

28. september fingu Annika H. og Andrias Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann er 56 cm langur og vigaði 4550 gr.

## Dagurin

**1. oktober.** Remigius, deyður í 533. Galliskur aðalsmaður, sum longu 22 ára gamal varð valdur til biskup í Reims. Hann kristnaði Chlodovech kong, sum var langabbi Karlamagnus. Remigius doyði 96 ára gamal.

**2. oktober.** Ditlev. Komin upp í halgramannatal í 1725. Ókent halgimenni. Upprunaliga týskt navn, samansett av orðunum fólk og arvur.

**3. oktober.** Metta. Teir vita ikki um nakra halgikvinnu við hesum navni. Navnið er Margreta stytt.

## Bjarni Dal-Christiansen 80 ár

Mánadagin 4. oktober fyllir Bjarni Dal-Christiansen í Havn 80 ár.

Bjarni er best kendur sum bilførari í Havn. Hann byrjaði sum ungur at koyra hýruvogn frá heiminum í Tórsgøtu, og var hann við til at stovna bilstøðina Taxa í Vágsbotni 1. januar 1944.

Hann koyrdi eisini í Taxa í Lucas Debesargøtu og Bilstøðini í J.C.Svabosgøtu.

Tá Bilstøðin bleiv løgd saman við Taxa í 1953, var Bjarni ein av fyrstu partaeigarunum í samanløgdnu støðini, P/F Taxa, sum í 1955 skifti navn til Auto.



Hann koyrdi í Auto til 1965, tá hann byrjaði sum sjálvstøðugur hýruvognsførari. Hann hevði nógvar privatar kundar.

Hann koyrdi í nøkur ár skúlabørn av Hvítanesi til Havnar og í fleiri ár rutukoyring millum Havnina, Kirkjubø og Velbastað.

Bjarni var bilførari í góð 50 ár, hann gavst í 1994. Hann var sera røkin og nærlagdur í sínum starvi.

Bjarni er føddur og uppvaksin í Tórsgøtu í Havn, yngstur av 5 systkjum. Foreldur hansara vóru Paulina Dal-Christiansen og Sophus Christiansen, vanliga nevndur Sophus skómakarin, bæði úr Havn.

Bjarni er giftur við Palmu, f. Rasmussen, av Skála. Børnini eru Annelin og Kári, og abbabørnini eru 5 í tali. Øll búgva tey í Havn uttan ein abbadóttir, sum býr í New Zealandi.

Bjarni er sera góður við síni, og abbabørnini eru alt hjá honum.

Dagurin verður hildin heima leygarkvøldið 2. oktober, har tey ið vilja ynskja Bjarna tillukku eru hjartaliga vælkomin.

## Lars Müller 30 ár

Í dag, leygardagin 2. oktober, fyllir Lars Müller handilsmaður í Havn 30 ár.

Lars hevur gingið í faðirsins fótasporum. Hann er føddur og uppvaksin í Havn, og sum 16 ára gamal fór hann í handilslæru á "Strøjnum" í Keypmannahavn, lærutíðin var fýra ár.

20 ára gamal fekk hann starv í klædnahandlinum hjá pápanum, Feðgar, í SMS.

Hann var við til at stovna



handilin "Skálkur" í SMS, og fyri fýra árum síðan keypti hann Skálk.

Lars er sonur Annu og Kára Müller í Hirtshals. Kári var við til at leggja lunnar undir SMS og var kædnahandilsmaður í 25 ár.

Lars er giftur við Hannu, f. Mohr, úr Runavík, dóttir Jonhild og Jákup Mohr.

Børnini eru, Jákup 11 ár, og Rebekka 5 ár.

## Katrina Hansen (Dinna) 80 ár

Katrina Hansen, fødd Simonsen, varð 80 ár 30. september. Føðingardagurin varð hildin saman við familju, vinum og kenningum.

Nú Katrina fyllir 80 ár, komu vit at hugsa um, hvussu røsk og energisk hon altíð hevur verið og enn er, og um alt, hon hevur lagt úr hondum gjøgnum árini.

Katrina hevur altíð havt stóran áhuga fyri hondarbeiði, hon lærdi at seyma í Sandavági hjá Sannu hjá Lísbitu.



Seinni fór hon við systrini Paulu at arbeiða á seymistovuni hjá Annu í Haraldsstovu í Keypmannahavn. Anna hevði lært at seyma hjá Fonnesbech, so hon var ein avbera góður lærumeistari. Katrina var nøkur ár niðri í Danmark. Heimafturkomin læt hon upp seymistovu í kjallaranum í barnaheiminum, har sera nógvar kvinnur hava lært at seyma og skera til.

Katrina hevur altíð havt sera góð evnir at flylgja við í mótanum, hon visti næstan, áðrenn tey ungu, hvat fór at vera "in" ella ikki.

Tað var altíð ein stuttleiki sum barn at síggja hana taka eitt klædnastykki fram, ið løtu seinni varð klipt og klárt at seyma.

Katrina hevur havt seymiskeið, næstan so leingi vit minnast, úti í gamla skúla í Sandavági, haðani hon er ættað. Tað er ógvuliga stuttligt og hugnaligt at minnast aftur á, tá hon tók maskinuna, pakkaði taskuna, teposar, mjólk í fløsku, keks, koppar o.a., og mann slapp við. Hetta var nakað heilt serligt, at klippa og seyma dukkuklæðir, ella hyggja í mótablaðið "Quelle".

Katrina arbeiddi á flakavirki í nógv ár, har hon gavst fyri 13 árum síðan. Katrina giftist sum 30 ára gomul við Palla Hansen av Slættanesi, og hóast tey eingi børn fingu saman, hava børn altíð verið meira enn vælkomin hjá teimum.

Ein systirdóttir er uppvaksin hjá teimum, og annars hava onnur børn í familjuni búð har í styttri og longri tíðarskeið. Tað er ikki smávegis av troyggjum, hosum og klæðum, ið hesi hava fingið gjøgnum árini. Palli doyði av krabbameini í 1991.

Katrina hevur m.a. seymað nógvar føroyskar búnar fyri fólk, bæði til kvinnur og menn, og er altíð blíð at koma inná gólvið hjá. Nú Katrina fyllir 80 ár, seymar hon av og á enn fyri fólk.

Katrina hevur altíð verið ung í sinni og ógvuliga røsk, mangan hevur ein tikið til: "Hevði ein bara orkað helvtina av tí, hon orkar, so hevði staðið væl til". Tú sært hana sjáldan uttan stokkar í hond, tí hon bindur uppá "ommubørn" ella " langommubørn", ella onkran annan í familjuni.

Hon er ein unglingi uppá 80 ár, og hon er okkum so ógvuliga kær.

Vit ynskja Dinnu hjartaliga tillukku við 80 - ára føðinardegnum.

**Familjan**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kjartan Mørkøre 75 ár

Sunnudagin verður Kjartan Mørkøre, fyrrverandi prestur í Havn, 75 ár. Kjartan er klaksvíkingur, men hevur seinastu 33 árini búð í Havn.

Kjartan Mørkøre er giftur við Elin, fyrrverandi lækna, og tey eiga børnini Jógvan, Katrin og Birnu. Eisini eiga tey seks ommu og abbabørn, sum mangan vitja í heiminum í Brøttulíð.

Í 1998 fór Kjartan



Mørkøre frá sum prestur við Vesturkirkjuna í Havn, og nú fer nógv tíð við at ganga úti í náttúruni, eins og honum dámar væl at fara ein túr í fjørðin.

Sjálvan føðingardagin hava Kjartan og Elin opið hús í heiminum frá klokkan eitt til fimm, og seinni um kvøldið verður døgurði fyri teimum nærmastu á einum av gistingarhúsunum í býnum.

## Andlát

27. september
Kitty Poulsen, Klaksvík, ættað av Selatrað, 82 ár.

Laurina Grevy, fødd Müller, ættað úr Porkeri, búsitandi í Valby, 92 ár.

Rakul S. Joensen, í Gásadali, 92 ár.

28. september
Joen Frederik Joensen, Funningsfir?i, 83 ár.

Elsa Magnussen, fødd Lamhauge, ætta? úr Lamba, búsitandi í Esbjerg, 65 ár.

Estrid Olsen úr Sandavági, 85 ár.

## Ein heilsa til mammu Henny Andreasen á hennara 65 ára degi!



*Blómur kunnu følna*
*Og hjørtur kunnu kølna*
*Men vakurleiki tín*
*Sum streymar út til mín*
*Er sum hin sólin bjarta*
*Tú skínur í mínum hjarta*
*Tú er mær so kær*
*Í huga mínum altíð nær*
*Hóast leiðin tín long*
*Og sorgin ofta trong*
*So skínur tú í ævir*
*Hyggið og gevið gætur*
*Tín glóð vil aldri kølna*
*Og tín vakurleiki aldri følna*
*Fyri mær ert tú yndislig og fín*
*Tí tú er jú…….. mamma mín!*

**Heilsan dóttir tín Linda**
**Valby 20. sept. 2004**

## Brúdleyp

Leygardagin 9. oktober kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Jóhanna við Streym, Norðskáli, og Jóhan Heiðrikur Mouritsen, Hoyvík. Dagurin verður hildin heima á Djúpagilsvegi 6, Hoyvík frá kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 9. oktober giftast Guðrun Godtfred Leo, Hvalba, og Mortan Ólason Vang, Tórshavn. Vígslan verður kl. 11.00 í Ebenezer. Familja, vinir og kenningar eru vælkomin í brúdleyp í HB-húsinum kl. 13.00.

Leygardagin 16. okt. kl. 16.00 giftast í Sands kirkju, Rannvá Jensen og Kristian Oskar Jónsson Henriksen. Døgverði verður fyri innbodnum í »Virkinum« kl. 19.00.

Dania Paula Danielsen og Bárður Dam í Baianstovu verða vígd í Vesturkirkjuni 6. november kl. 15.00. Veitslan verður í HB-húsinum sama dag kl. 19.00. Øllm ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at boða frá á 322301 ella 322303 í seinasta lagi sunnudagin 10. oktober.

Leygardagin 20. november kl. 16.00 giftast í Vitninum í Hvalba Gunna Dimon og Jón við Neyst, bæði úr Hvalba. Veitslan verður á Hotel Øravík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 375189 ella 580168 áðrenn 30. oktober.

Leygardagin 20. november kl. 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Amalia Hansen, Klaksvík, og Ólavur M. Lamhauge, Søldarfirði. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 456728 ella 441168 áðrenn 10. november.

## Konfirmantarnir í Tvøroyrar kirkju sunnudagin 3. oktober

Sólfríð Bech, Tvøroyri
Christopher Hammerfoss Craib, Tvøroyri
Hallur Finnbogason Danielsen, Tvøroyri
Anna Kathrina Eysturberg, Tvøroyri
Gunleif Olsen, Tvøroyri
Guðrun Nielsen, Tvøroyri
Jutta Thomsen, Tvøroyri
Maria Vang, Tvøroyri
Sarah Idannguaq Bjarkadóttir Jensen, Froðba
Gunnar Tollakkur í Dali, Trungisvágur
Sóley Dimon, Trungisvágur
Sjúrður Jóhann Ferjá, Øravíkarlíð
Ása Johanna Pólsdóttir, Øravíkarlíð
Jón Magnusarson Ellendersen, Fámjin
Sára Yvonna Olsen, Hvalba

## 85 ára føðingardagur

Í dag, 2. oktober, verður Johanna Johannesen, Johanna í Kinn, Fuglafjørður, 85 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 17–22.

## 75 ára føðingardagur

Mánadagin 4. oktober verður Gudrun Joensen, Hósvík, 75 ár. Dagurin verður hildin mánakvøldið hjá Harriet og Petur.

## Brúdleyp

Í dag, 2. oktober, giftast Ása í Lambanum, Norðragøtu, og Marjus Hansen, Skálafirði. Døgurði verður fyri innbodnum á Muntra, og drekkamuður verður í Bygdarhúsinum í Hósvík frá kl. 19.00, har øll eru vælkomin.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu við okkum, við at fylgja okkara góða manni, pápa, verfaðir, abba og langabba

**Arnhold Davidsen**

til hansara seinasta hvíldarstað.

Ein serlig tøkk til heimahjálparar og sjúkrasystrar sum vóru um hann.

Eisini tøkk fyri kransar og blómur og fyri peningagávur til Fríðrikskirkjuna.

Hjartaliga tøkk øll somul.

**Henny**
**Aloma, Hanus, Niclas, Annika, Harda og Fróði**

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum gleddu meg á 80 ára degnum 12. september.

Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit, kort og telefonsamrøður. Og takk til tykkum, sum gjørdu mær dagin so hugnaligan.

Heilsan
**Esther Hentze**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum heiðraðu og gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 13. september.

Heilsan
**Signhild Thomsen**
**Fuglafjørður**